# VIRUS – 13 søgur

eftir Sámal Soll

## Arbeiðshefti til undirvísingarbrúk - ætlað miðnámi



# Innihaldsyvirlit

Hvussu kann hetta heftið brúkast ........ 3
Bara eitt kill aftrat ........ 4
Túsund og eitt ting ........ 5
Tað sama ........ 6
Virus ........ 7
Eingin ivi ........ 8
Ígjøgnum skákrimarnar ........ 9
Mammudrongur ........ 10
Veitst tú hvat ........ 11
Eitt ljóð úr stovuni ........ 12
Nú steðgar hetta! ........ 13
Vetrartíð ........ 14
Oljuberjaoljan ........ 15
Alarm ........ 16
At lesa savnið sum verk ........ 17
Hugskot til tvørfakligt samstarv ........ 18
UMMÆLI: VIRUS OG ANNAÐ GOTT ........ 19
At greina stuttsøgur ........ 21
13 spurningar til rithøvundan ........ 24
Annað tilfar eftir og um Sámal Soll ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**
Um rithøvundin ........ 27

## Hvussu kann hetta heftið brúkast

Hetta heftið við arbeiðsspurningum er ætlað lærarum og næmingum í miðnámsskúlum, sum vilja arbeiða við stuttsøgusavninum *VIRUS – 13 søgur* í føroyskundirvísingini.

Heftið er skipað soleiðis, at spurningar og uppskot til kjakevni og atknýtt arbeiðsevni standa undir hvørjum søguheiti sær. Fyrst er uppskot til, hvat arbeiðast kann við, áðrenn søgan verður lisin, og síðani eru uppskot til spurningar og kjakevni, ið næmingar kunnu arbeiða við eftir, at søgan er lisin. Hetta heftið er hvørki fullfíggjað ella umboðandi eina ávísa "rætta" fatan av, hvussu søgurnar skulu skiljast, tí skaldskapur er altíð opin fyri øðrum tulkingarmøguleikum enn teimum, sum vit - í fyrstu atløgu - halda. Somuleiðis kunnu summir spurningar og summi kjakevni tykjast at vera í so grunn, og aðrir spurningar og kjakevni í so djúp. Hetta er fyri at hava eina breidd, so arbeiðsheftið hevur okkurt til allar árgangir á miðnámsskúlunum.

At enda eru meira nágreinilig hugskot til, hvussu arbeiðast kann við savninum sum verk, umframt hvussu arbeiðast kann tvørfakligt við samfelagsfrøði.

**VIRUS**

VIRUS er annað stuttsøgusavnið eftir Sámal Soll, sum hevur verið virkin rithøvundur í mong ár. Fyrra stuttsøgusavn hansara, Glasbúrið kom út í 2015. Í ummælinum "Glasbúrið sker ígjøgnum", sum Anna Poulsen og Rebekka Manuela Behrens skrivaðu fyri Röddina, ungdómspallin hjá KVF, stóð :

> "Stuttsøgusavnið er eitt nýbrot í føroyskum skaldskapi, tá talan er um skaldskap til ung. Hetta stuttsøgusavnið riggar. Tað er ikki ov yvirflafiskt ella óneyðuga "cheesy". Eisini dregur hann nútímans viðurskiftir inn, sum tú eisini lesur í enskum og donskum skaldskapi, men tó er tað serligt, at vit ungu kunnu lesa hetta, har vit samstundis hoyra um føroysk staðarnøvn."

Somuleiðis viðmerkti ummælarin Vónbjørt Vang í Grindini hóskvøldið 12. november í 2015, at savnið er "hart tiltrongt" í føroyskum skaldskapi, tí tað viðger evni, sum ung fólk halda vera spennandi og viðkomandi, og harumframt er málbúnin nútíðarhóskandi.

Eitt yvirlit yvir ummælir, og aðrar viðkomandi upplýsingar um savnið og rithøvundan, er á heimasíðu rithøvundans: www.samalsoll.wordpress.com.

# Bara eitt kill aftrat

## Áðrenn tú lesur søguna

**Slangorð í føroyskum**

Arbeiðið saman tvey og tvey. Uppá 5 - 10 minuttir skulu tit skriva so mong útlendsk slangorð niður, sum tit finna. Hetta skulu vera orð, sum tit brúka dagliga. Dømi: *Awkward* (ens) og *klamt* (dk). Síðani velja tit 3-4 orð hvør burturúr teimum, sum tit hava skrivað niður. Hesi verða skrivað upp á talvuna.

1. Hvar munnu útlendsku slangorðini koma frá og eru eins mong ensk og t.d. donsk?
2. Nær brúka tit slangorðini? Er tað tá tit skriva ella tá tit tosa ella bæði? Er tað saman við vinum ella saman við familju? Og hvussu tá tit eru í skúla?
3. Orðini "mega" og "kul" eru kanska dømi um slangorð, sum eru meiri ella minni sloppin upp í føroyskt talumál (børn, ung, vaksin, gomul brúka tey). Met um, hvørt nøkur av orðunum, sum tit skrivaðu á talvuna, verða eins føroysk sum "mega" og "kul" um eini 20 ár.
4. Kann tað hugsast, at foreldur tykkara eisini hava nýtt útlendsk slangorð, tá tey vóru yngri? Hvussu við ommum og abbum tykkara? Brúka tey enn slangorð? Hvørjum fremmandamál koma teirra orð úr, um tað eru nøkur?
5. Hvussu mong upprunaføroysk slangorð duga tit? Dømi: ræst.
6. Fer tykkara mál at broytast, sum tit gerast eldri ella fara tit altíð at halda fram at tosa, sum tit gera? Hvørji viðurskifti í (vaksnamanna)lívinum kunnu ávirka hetta?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs persónarnar í stuttsøguni í stuttum.
2. Hvussu koma munir millum ættarliðini til sjóndar í søguni?
3. Hevur stuttsøgan ein boðskap?
4. Hvussu skilir tú endan á søguni?
5. Hvat kanst tú siga um heitið á søguni? Hvat sipar tað til?

**Víðari kjak um formligt og óformligt mál**

1. Farið í **Sýni&Dýpi1 / Mál í nýtslu / Málsligt fjølbroytni / Formligt og óformligt mál** og lesið tekstin har. Lurtið eftir fótbóltsfrásøgnini og svarið spurningunum.
2. Summi vilja vera við, at telduspøl eru vandamikil, eru tey tað?

**Stutt skrivlig uppgáva**

Skriva eina samrøðu ímillum ommuna og lítlabeiggjan, har hann greiðir henni frá einum øðrum telduspæli (t.d. Minecraft) og hon greiðir honum frá, hvussu hon plagdi at gera, tá hon mjólkaði neytunum heima í heimbygdini, tá hon var ung genta.

# Túsund og eitt ting

## Áðrenn tú lesur søguna

**Sosialir miðlar**

3. Hvussu kennist tað, tá tú fært nógv *likes* til okkurt, sum tú leggur út á sosialu miðlarnar, t.d. Instagram?
4. Hvussu kennist tað, tá tú fært sera fá *likes* til okkurt, sum tú leggur út á sosialu miðlarnar?
5. Hevur tú nakrantíð strikað okkurt, sum tú legði út, tí tað ikki fekk nóg nógv *likes*?
6. Hevur tú onkuntíð valt ikki at trýsta á dáma okkurt, sum onkur hevur lagt út, tí tú vart ill/ur við tann persónin?
7. Hvussu leingi hevði tú klárað teg uttan sosialu miðlarnar (Facebook, Instagram, Snapchat o.s.fr.)?
8. Hevur tú nakrantíð umhugsað at strika allar tínar profilar á teimum sosialu miðlunum? Hví? Hví ikki?
9. Taka sosialu miðlarnir ov nógva tíð frá t.d. familjusamveru og øðrum?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs umhvørvið í søguni.
2. Hví er familjan sein á fótum hendan morgun?
3. Hvussu er uppgávubýtið foreldranna millum?
4. Kanna hvussu ofta søgan nevnir veðrið og hita. Hevur veðurlagið nakra ávirkan á huglagið í søguni?
5. Hvar eru persónarnir í søguni, tá hon endar? Hvar er Lítla?
6. Hvør hevur "skylduna" av tí, sum fer fram?
7. Eru dømi um framlit[1] í søguni?

**Kjak**

1. Er munur á, hvussu ung og vaksin brúka sosialar miðlar í Føroyum?
2. Hvør man brúka meira tíð uppá sosialar miðlar?
3. Far á netið og kanna útlendskar tíðindasíður, og kannið um hetta er nakað, sum ofta kemur fyri. Googlið t.d. "mom/dad forgets child in car" ella "mor/far glemmer barn i bilen"

**Stutt skrivlig uppgáva**

Skriva eitt stutt framhald av søguni, sum snýr seg um, hvussu restin av degnum er fyri familjuna.

[1] Framlit er, tá tá ið tráðurin verður slitin í skaldsøgu e. ø. við innskoti úr framtíðini ella upplýsingum um framtíðina (ens: foreshadowing).

## Tað sama

### Áðrenn tú lesur søguna

1. Grein og tulka permumyndina, sum danska listakvinnan Tatiana Goldberg hevur teknað til stuttsøgusavnið.
2. Listakvinnan hevur teknað permumyndina við íblástri frá stuttsøguni *Tað sama*. Skriva nakrar tankar niður, um hvat tú væntar, at stuttsøgan fer at vera um.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Greina huglagið í søguni. Vís á við dømum úr søguni.
2. Ger viðmerkingar til hetta brotið "Tær høvdu ongantíð møtst í veruleikanum, men eingin kendi Eydnu so væl sum Helena."
3. Hvat er hent áðrenn søgan byrjaði? Eru nakrar ábendingar um tað?
4. Søgan er í tveimum pørtum. Ger eina persónslýsing av ónevnda manninum, sum vit møta í øðrum parti av søguni.
5. Greina sjónarhornið í søguni.
6. Hvussu sannlíkar eru hendingarnar í søguni, tá hugsað verður um, hvussu vit ferðast á netinum, eitt nú í ymiskum bólkum á sosialum miðlum?

**Kjak**

1. Hvat er eitt internet-trøll[2] og hvat gera hesi vanliga?
2. Hevur tú upplivað trøll á t.d. Facebook?
3. Kannið hugtakið "catfishing" t.d. á netinum ella hyggið at dokumentarfilminum *Catfish* frá eftir Henry Joost og Ariel Schulman.
4. Hevur tú upplivað – ella kennir tú nakran, sum hevur upplivað - "catfishing"?

[2] Ens: troll

# Virus

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Virus” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um.
2. Samanberið tykkara úrslit í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Ger ein stuttan samandrátt av søguni.
2. Hvussu fær høvuðspersónurin eyknevnið Virus?
3. Hvat eyðkendi lívið hjá Virgari, tá  hann var barn og ungur drongur?
4. Hví var tað eitt perfekt starv hjá Virgari at arbeiða sum náttarvørður á einum hotelli?
5. Lýs Vilhelm.
6. Ger viðmerkingar til hetta brotið: “Tað gjørdist mær greitt, at hann nú var komin inn í mína verð.”
7. Virgar fer í smálutir, tá hann greiðir okkum frá, hvussu hann bar seg at við at gera telduvirus, og tá hann seinni brúkar telduforrit til at taka ræðið á telduni hjá Vilhelmi og øðrum. Hví man tað vera?
8. Eru hesar frágreiðingar trúverdugar?
9. Ger viðmerkingar til hetta brotið: “Eg mundi tikið synd í honum einaferð, men eg segði við meg sjálvan, at eg hevði bara sligið aftur upp á tann mátan, sum eg dugdi.”
10. Greið frá mannagongdini, tá Virgar fer í holt við eitt nýtt offur.
11. Hvat er temað í søguni? Vís á dømir í tekstinum, sum stuðla tínum svari.

Kjak

1. Virgar brýtur nógvar lógir, tá hann roynir at fanga pedofilar og aðrar brotsmenn. Er tað í lagi, at tú brýtur lógir, um endamálið er gott? (t.d. at fanga pedofilar)? Hvar er markið?
2. Vit hoyra um staðarnøvn og gøtunøvn í søguni. Á hvønn hátt ávirkar hetta tína uppliving av søguni samanborið við, um søgan gekk fyri seg aðrastaðni í heiminum?

# Eingin ivi

## Áðrenn tú lesur søguna

**Skriva eina stutta stuttsøgu**

"Eingin ivi" er ein stutt stuttsøga. Roynið tykkum við at skriva eina stutta stuttsøgu. Hon má ikki vera longri enn eina síðu. Søgan skal hava byrjan, miðju og enda.

Tit kunnu skriva um júst tað, sum tit vilja. Tit kunnu eisini velja at skriva eina søgu, sum hevur tveir ella tríggjar av hesum lutum í sær:

1. eitt summarhús í Mykinesi
2. eitt súrepli á einum kodda
3. ein gamlan bil uttan nummarplátur
4. eitt gult stearinljós
5. eina hvíta damusúkklu

## Eftir at tú hevur lisið søguna

**Tekstfatan. Rætt / Skeivt:**

1. Dreingirnir eita Jann og Birgir?
2. Teir sita við teldu í fríkorterinum og hyggja at einum ræðufilmi?
3. Jann er saman við Sofíu.
4. Birgir varnast, at hann er á eini mynd í Google Streetview
5. Birgir fortelur Sofíu sannleikan.
6. Sofía hevur eisini verið ótrúgv.
7. Birgir fyrigevur henni alt.

**Greining**

1. Hvat er temað í stuttsøguni "Eingin ivi"? Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
2. Eru persónarnir rundir ella flatir?[3] Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
3. Hvussu er ungdómurin lýstur í søguni?
4. Hvussu eru kynsleiklutirnir lýstir í søguni?

**Kjak**

1. Privatlív á netinum er eitt evni í stuttsøguni "Eingin ivi". Er okkara privatlív nóg væl vart á internetinum? Er tað vandamikið at leggja persónligar myndir á Facebook, Instagram og Snapchat? Leggja vit ov nógvar upplýsingar um okkum sjálv á alnetið?
2. Roynið at googla tykkara egnu nøvn fyri at síggja, hvussu nógvar upplýsingar um tykkum eru á netinum. Trýstið eisini á myndir. Eru tit ovfarin av úrslitinum?

[3] Sí allýsing á síðu 25.

# Ígjøgnum skákrimarnar

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni "Ígjøgnum skákrimarnar" í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um. Hvat munnu hesar skákrimar vera?
2. Samanberið tykkara úrslit í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Ger ein stuttan samandrátt av søguni.
2. Greið frá sjónarhorni í søguni.
3. Hvar í landinum gongur søgan fyri seg?
4. Greið frá umhvørvinum annars.
5. Ber tað til at vísa á dømir um ironi í søguni?
6. Er frásøgufólkið álítandi?
7. Hví er tað frásøgufólkið, sum skal til Havnar at møtast við Eiriki?
8. Finn sitat í søguni, sum geva ábendingar um, at frásøgufólkið er hugtikið av samkyndleika.
9. Greið frá, hvat frásøgufólkið ger í íbúðini hjá Eiriki. Hví ger hann hetta?
10. Hvussu skulu vit skilja endan á søguni?
11. Hvat merkir heitið? Hóskar tað til søguna?
12. Hvat hendir við frásøgufólkinum eftir søguna?

**Kjak**

1. Hyggið at øllum ella nøkrum pørtum av sendingunum "Av hinum slagnum" á heimasíðuni hjá KVF um søguna hjá samkyndum í Føroyum.
2. Vitjið www.lgbt.fo og síggið m.a. yvirlit yvir føroyskar bøkur, søgur og sangir, sum viðgera samkyndleika.

**Skrivlig uppgáva**

1. Frásøgufólkið verður verandi í Havn í nakrar dagar, tí hann má hugsa um ymiskt. At enda velur hann at skriva eitt bræv til konu sína heima í bygdini, tí hann má greiða henni frá, hvat hendi. Skrivið brævið, sum hann sendir (200-300 orð).

## Mammudrongur

### Áðrenn tú lesur søguna

**Tinder**

1. Arbeiðið saman tvey og tvey. Finnið upp á ein persón og skrivið hansara ella hennara Tinder bio-tekst (100-150 orð).
2. Skrivið síðani 3-5 góðar skorireglur, sum hann/hon kann byrja eitt Tinder-kjatt við. Tað er loyvt at nýta hugflogið.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Stuttsøgan byrjar mitt í eini samrøðu – in medias res. Hvørja ávirkan hevur tað á lesiupplivingina?
2. Eru persónarnir rundir ella flatir? Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
3. Hvat er temað í stuttsøguni "Mammudrongur"? Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
4. Hvussu er málið í søguni. Hví er tað so?
5. Hvussu er tín meting av søguni? Hevur hon ein boðskap?
6. Finn dømi um slangorð, sum ikki eru í orðabókini.
7. Ber tað til at finna ábendingar (framlit) um plott-tvistið, um man lesur stuttsøguna ígjøgnum umaftur?
8. Var Eli (og vinmenninir) fullvitandi um, hvønn hann setti hann upp við?
9. Hvønn týdning hevur tað fyri søguna, at hon hevur ein opnan enda?

**Kjak**

1. Hvørjir fyrimunir og vansar eru við Net-dating á appum sum t.d. Tinder?

**Skrivlig uppgáva:**

1. Skrivið stuttsøguna "Mammudrongur" umaftur, men út frá sjónarhorninum hjá mammuni hesaferð.
2. Hvat hendir aftaná, at søgan endar? Skrivið eitt framhald á 150 orð.

# Veitst tú hvat

## Áðrenn tú lesur søguna

1. Stuttsøgan “Veitst tú hvat,” kann sigast at vera parlag og tær avbjóðingar, sum kunnu vera í slíkum. Hvørjar munnu vera tær vanligastu orsøkirnar til, at fólk gera tað liðugt við hvørt annað?
2. Sambært Hagstovu Føroya (www.hagstova.fo) skiljast á leið helmingurin av teimum, sum giftast í Føroyum aftur. Eru fólk ov skjót at gera tað liðugt?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs parlagið hjá Karl og Óluvu.
2. Hvussu hevur teirra lív verið áðrenn søgan byrjar?
3. Hvussu er bygnaðurin í søguni?
4. Greið frá sjónarhorninum í søguni.
5. Hevur søgan ein boðskap?

**Kjak**

1. Hava vaksin fólk somu parlagstrupulleikar sum ung fólk? Ella er munur á? Hvørjir?
2. Samanber søguna við “Eingin ivi” í sama savni við serligum atliti at lýsingini av parlagnum.

**Meira um parløg í føroyskum bókmentum**

Nakrar aðrar føroyskar stuttsøgur, sum eisini eru um parløg eru:

- Marjun S Kjelnæs: “Lykilin”
- Sólrun Michelsen: “Rottan”
- Sólrun Michelsen: “Sunnudagur”
- Hanus Kamban: “Hin bláa kannan”
- Súsanna Egholm: “Best er at binda um heilan fingur”
- Arnbjørn Dalsgarð: “Eisini slíkt, sum nívir”
- Regin í Líð: “Rakul”
- Jens Pauli Heinesen: “Ein poetisk søga um Sólvá og Tórir”
- Jóanes Nielsen: “Tove og Elias”
- Karsten Hoydal: “Eini hjún”

## Eitt ljóð úr stovuni

### Áðrenn tú lesur søguna

**Geymarir**

Vitjið heimasíðuna hjá føroyska málráðnum – malrad.fo - og hyggið at orðunum í orðalistanum við nýggjum føroyskum orðum. Millum orðini á orðalistanum eru orðini "geymari" og "geyming." Hesi eru føroysku orðini fyri ensku "gamer" og "gaming."

1. Hvat eyðkennir ein geymara?
2. Lýs ein føroyskan geymara.
3. Er man ein geymari, um man spælir Tetris á farteldduni?

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs í stuttum persónarnar í søguni.
2. Hvussu er ungdómur lýstur í søguni?
3. Lýs umhvørvið í søguni. Hvar gongur hon fyri seg?
4. Hvat er klimaksið í søguni?
5. Hvør er tað, sum mamma Magnus er saman við?
6. Kom endin á søguni óvart á teg? Hví?
7. Samanber søguna við aðrar søgur í savninum.
8. Samanber søguna við aðrar søgur/tekstir.
9. Greið frá málinum í søguni (t.d. hátíðarligt, talumál, fremmandaorð, banniorð, slang, o.s.fr.)

**Skrivlig uppgáva**

1. Hvat hendir aftaná, at søgan endar? Skrivið eitt framhald á 150 orð.

# Nú steðgar hetta!

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni "Nú steðgar hetta!" í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um. Hvat man tað vera, sum skal steðga?
2. Samanberið tykkara úrslit í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hvør er høvuðspersónurin í søguni?
2. Hvussu hevði søgan verið, um sjónarhornið var hjá einum øðrum persóni í søguni?
3. Hvussu er tín meting av søguni? Hevur hon ein boðskap?
4. Met um dygdina á tekstinum, tá hugsað verður um mál, evni o.a.
5. Lýs trupulleikarnar hjá næminginum.
6. Lýs trupulleikarnar hjá læraranum.

**Horror**

Stuttsøgan "Nú steðgar hetta!" kann flokkast undir sjangruni horror ella ræðusøgur.

1. Skrivið ein lista yvir 5 tær óhugnaligastu horror-søgurnar ella filmarnar, sum tit hava lisið ella sæð.
2. Roynið og skrivið niður, hvat tað er, sum ger júst hesar søgur óhugnaligar (15-20 minuttir tilsamans).
3. Samanberið við "Nú steðgar hetta".

**Kjak**

1. Hvør er "tann óndi" í søguni?
2. Les spurning nr. 13 í "13 spurningar til høvundin" í hesum heftinum, har rithøvundurin fortelur um søguna. Átti hann at havt strikað søguna. Hví? Hví ikki?
3. Lesið stuttsøguna "Móðurkærleiki" í stuttsøgusavninum Glasbúrið eftir Sámal Soll og samanberið.

# Vetrartíð

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni "Vetrartíð" í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um.
2. Samanberið tykkara úrslit í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hvør er maðurin, sum stendur uttanfyri?
2. Hví situr høvuðspersónurin hvørt ár um somu tíð og hyggur at klokkuni?
3. Hvat merkir heitið? Hóskar tað til søguna?
4. Greið frá bygnaðinum.
5. Hvussu long er tíðin í søguni (søgutíðin)
6. Er myndamál í stuttsøguni?
7. Vel trý sitat úr søguni, sum tú heldur hava serligan týdning.
8. Hvat er veruleiki og hvat er dreymur í søguni?

**Kjak**

Sigmund Freud skrivaði í 1900 eina bók um dreymatulking (á týskum: Die Traumdeutung), har hann skrivar, at okkara undirvitska roynir at greiða okkara óttar og traumur í dreymum, tí tá sleppur undirvitskan framat og er ikki hildin niðri av okkara vakna tilviti.

Hevur Freud grein í sínum máli? Hvat eru dreymar og hví hava vit onkuntíð marrur?

## Oljuberjaoljan

### Áðrenn tú lesur søguna

**Superhetjueginleikar**

1. Hvørjar superhetjueginleikar hevði tú viljað havt?
2. Hvat hevði tú gjørt, um tú hevði hendan superhetjueginleikan?

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Ger ein stuttan samandrátt av søguni.
2. Hvat merkir heitið? Hóskar tað til søguna?
3. Hvussu long er tíðin í søguni (søgutíðin)
4. Lýs høvuðspersónin.
5. Er frásøgufólkið álítandi?
6. Hvar í landinum gongur søgan fyri seg?
7. Greið frá umhvørvinum annars.
8. Ber tað til at vísa á dømir um ironi í søguni?

**Kjak**

1. Hvussu er tín meting av søguni? Hevur hon ein boðskap?
2. Met um dygdina hjá tekstinum, tá hugsað verður um mál, evni o.a.
3. Hvat hevur tað at siga fyri søguna, at hon gongur fyri seg í einum kendum umhvørvi (SMS o.s.fr.)

**Skrivlig uppgáva**

1. Hvat hendir aftaná, at søgan endar? Skrivið eitt framhald á 150 orð.

**Millumtekstasambond**

1. Lurtið eftir útvarpsleikinum “Petur Oluf Rasmusarson Norðvík” á heimasíðuni hjá KVF og viðgerið sambandið millum ta søguna og hesa.

## Alarm

# Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Alarm” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um.
2. Samanberið tykkara úrslit í flokkinum.

# Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Ger ein stuttan samandrátt av søguni.
2. Nær gongur søgan fyri seg?
3. Hvar gongur søgan fyri seg? Hvussu verður umhvørvið annars lýst?
4. Hvørjir eru høvuðspersónar og hvørjir eru eykapersónar?
5. Hvussu eru persónarnir lýstir?

**Kreativ uppgáva í 2-3 bólkum (2-3 blokkar)**

1. 1. blokk: Í bólkum, umskrivið stuttsøguna til eitt einfalt stuttfilmshandrit, har tit brúka samrøðurnar í søguni og leggja aftrat um neyðugt.
2. 2. blokk: Takið filmin upp við tykkara myndatólum ella telefonum. (GG: Stundir eru ikki til at framleiða ein heilan spælifilm). Gerið filmin lidnan í frítíðini, um neyðugt.
3. 3. blokk: Vísið tykkara filmar fyri flokkinum.

## At lesa savnið sum verk

Nøkur evni ganga aftur í flestøllum søgum í savninum. Til ber at arbeiða við savninum sum verk um denturin verður lagdur á hesi evni ella temu.

**Uppskot:**

Næmingarnir lesa alt savnið. Næmingarnir skipa síðani stuttsøgurnar í temu saman við læraranum. Lærarin skrivar upp á talvuna. (Eitt dømi er her).

| Parløg/ kærleiki | Harðskap /happing | Tøkni/ internet | Ungdóm | Hevnd | Mál | Deyðin | Nútíðarsa mfelag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mammudr. | Nú steðgar hetta! | Bar eitt kill aftrat | Eingin ivi | Virus | Bara eitt kill aftrat | Vetrartíð | Bara eitt kill aftrat |
| Eitt ljóð úr stovuni | Virus | Virus | Bara eitt kill aftrat | Mammudr. | Virus | Túsund og eitt ting | Vetrartíð |
| Gjøgnum skákrimar | Mammudr. | Mammudro ngur | Eitt ljóð úr stovuni | Veitst tú hvat? | Eitt ljóðúr atovuni | Bara eitt kill aftrat | Virus |
| Veitst tú hvat? | Alarm | Eingin ivi | Mammudr. | Nú steðgar hetta | Mammudr. | Tað sama | *Parvíst allar* |
| Tað sama | Veitst tú hvat? | Veitst tú hvat? | Tað sama | Alarm | *Parvíst allar* | | |
| Eingin ivi | Bara eitt kill aftrat | Tað sama | Nú steðgar hetta | | | | |
| Alarm | | Túsund og eitt ting | Alarm | | | | |
| Oljuberjaol. | | Alarm | Virus | | | | |

Bólkaarbeiði:

Hvør bólkur velur eitt tema at arbeiða við. Greina og tulka stuttsøgurnar, sum eru undir temanum. Serliga umráðandi er at samanbera tær hvør við aðra.

Aðrir viðkomandi tekstir at nýta í sambandi við temuni:

- "Fara vit heldur at speaka enskt?" eftir Hjalmar P. Petersen & Sissal M. Rasmussen (https://www.setur.fo/fo/setrid/tidindi/fara-vit-heldur-at-speaka-enskt/)
- "Formligt og óformligt mál" í Sýni og dýpi 1
- Illtonkt/munnhøgg á YouTube-kanalini hjá Swangah (https://www.youtube.com/channel/UC6QrTdBd4EUeTC1-Ti4xDmQ)
- Útvarpssamrøða við høvundan í Nón (https://kvf.fo/non?sid=101487&page=1)
- "Virus og annað gott" - Ummæli av savninum í Varðanum (eisini í hesum arbeiðsheftinum)
- "Petur Oluf Rasmusarson Norðvík" útvarpsleikur: https://kvf.fo/reidrid?sid=55225
- Heimasíðan hjá høvundinum: www.wordpress.com/samalsoll

# Hugskot til tvørfakligt samstarv

**Samfelagsfrøði**

Evni: Sosiologi

**Við støði í stuttsøguni "Tað sama" í stuttsøgusavninum "Virus" eftir Sámal Soll og kapittul 1 í SamfNU C, skulu tit lýsa og viðgera hesar spurningar**

1. Greið frá identitetsløgunum og hvønn týdning løgini hava fyri okkara identitet.

2. Við støði í tørvinum hjá menniskjum at verða viðurkend og identitetsløgunum, ið vit lesa um í SamfNU C, hugleið um, hví Eydna hevur tunglyndi og sjálvmorðstankar.

3. Á s. 19 í søguni stendur;

" Fyrr setti hon slíkt veður í samband við familjuhugna innandura. Nú kendi hon hvørki hugna ella familju".

Hvønn týdning hevur arvur og umhvørvi á okkara identitetsbúning og hvussu heldur tú Eydnusa arvur og umhvørvi hevur verið.

4. Lýs teir fýra sosialiseringhættirnar og greið frá hvønn týdning teir hava fyri okkara identitetsbúning.

5. Axel Honnet vísir á, at vit menniskju hava tørv á viðurkenning í øllum trimum stigunum. Greið frá viðurkenningstigunum hjá Honnet og vís á hvør møgulig avleiðing er, um ein ikki fær fulla viðurkenning. Kann hugsast, at Eydna ikki hevur fingið fulla viðurkenning.

6. Hvat er ein sosial arena?

7. Hvar í søguni síggja vit dømi um fysiska- og virtuella sosiala arenu.

8. Lýs og greið frá hugtøkunum hjá Erving Goffman Backstage og Frontstage[4].

9. Er Eydna í Frontstage ella Backstage í samskiftinum við Helenu?

10. Lýs og greið frá fyrimunum og vansum við fysisku og virtuellu sosialu arenunum.

---

[4] Erving Goffman er kendur fyri sítt ástøði um sosiala lívið sum eitt leikhús (úr Presentation of the Self in Everyday Life frá 1959). Goffman brúkti leikhúsið sum metaforur fyri, hvussu vit vísa okkara "self" í sosiala lívinum. Her brúkar hann hugtøkini frontstage og backstage til at lýsa hesi støðini: tað sosiala og tað privata. Í sosialari interaktión eru menniskju eins og sjónleikarar, sum standa frammanfyri eini áskoðarafjøld. Her leggur man dent á tey positivu og dámligu aspektini av okkara "self" og á tað, sum verður mett at vera normalt í samfelagsligum høpi. Backstage kann man so fara úr leiklutinum og vera ein sjálv/ur uttan at skula liva upp til almenna leiklutin. (Goffman, 1959)

## UMMÆLI: VIRUS OG ANNAÐ GOTT

Eftir Sannu Klein

Seinast Sámal Soll gav út eitt stuttsøgusavn, jublaðu nógv á miðnámsskúlunum kring landið. Fremst stóðu føroysktlærarnir, ið fingu meira av nýggjum føroyskum tilfari at brúka í undirvísingini, men savnið fekk eisini yngra lesaraskaran at vísa stórt nøgdsemi, m.a. tá ungdómssendingin Røddin ummælti savnið, og kom við einari tí bestu viðmerkingini um føroyskan skaldskap higartil: "Sámal torir at kalla ein harðan murt fyri ein harðan murt og skriva um blóðuttar fucked-up hendingar." (Kvf, 2015)

Eisini hesaferð, við nýggja savninum "Virus", vísir Sámal Soll góð evni at skriva fjølbroytt. Savnið inniheldur 13 stuttsøgur, nakrar hava staðið í ungdómsblaðnum Ó og nakrar eru nýggjar. Heitið á savninum er vælvalt, tí nútímans tøknin fyllir nógv í søgunum, t.d. heilsa vit upp á game'arar, telduúrmælingar og vanliga facebookbrúkaran. Í søguni "Virus" fylgja vit enntá einum teldusnillingi frá tí fyrstu Amiga-telduni í farnu øld, til hann gerst partur av felagsskapinum Anonymous og ferðast runt á "the dark web".

Sum heild eru tvey sløg av søgum í savninum. Tað eru tær stuttu, "skørpu", við einum ofta skeivum vinkli, og ofta hava hesar eisini ein yvirraskandi enda. Hetta eru søgurnar, sum rithøvundurin kanska er mest kendur fyri, og tær sum hóska sera vil til at geva út í ungdómsbløðum o.ø.

Síðani eru nakrar longri søgur. Her fær søgugongdin betri rúmd, men eisini her er skeivi vinkulin til staðar, og áhugaverdu tvístøðurnar, avskeplingin og løgnu persónmenskurnar fáa betri stundir at breiða seg út fyri lesaranum. Søgurnar "Virus", "Oljuberjaoljan" og "Veist tú hvat" hoyra til hetta seinna slagið.

Í "Virus" sleppur høvuðspersónurin sjálvur framat, og greiðir frá lívi sínum, og stóra telduáhuganum. Høvuðspersónurin er sjálvandi ein outsidari, Virus-Virgar, sum greiðir frá lívi sínum, frá at verða happaður sum yngri, til endiliga at fáa hevnd. Virus-Virgar sær seg sjálvan sum ein samfelagsrevsara, ein sum stríðist fyri góðu sakini, og revsar tey óndu í samfelagnum. Tíverri, fyri Virus-Virgar, fær søgan eitt slag av einum hybris-enda, tá hesin sjálvhevjaði dómarin yvir rætt og skeivt, gloymir at gera arbeiðið nóg gjølla, og endar sjálvur sum tann revsaði.

**Fløkjalig parløg**

Søgurnar í savninum lýsa fleiri ymisk parløg og seksuell sambond, og sum oftast er talan um parløg við trupulleikum. Vit lesa m.a. um ótrúgv miðnámsskúlapør, um mammudrongin sum endiliga fær eina freka date og um gifta mannin, ið nøktar sær í oljuberjaolju, meðan hann goymir upp á stórar loynidómar.

Í søguni "Veist tú hvat" eru tó trupulleikar, sum tykjast enn meira samansettir. Vit fylgja Óluvu og Karl og hjúnabandi teirra. Við smáum tilspingum og øðrum viðmerkingum, skilja vit so við og við, at her eru trupulleikar í hjúnabandinum. Vit hava bara ógvuliga ringt við at gera av, hvør er størsti trupulleikin. Lesarin fer nevniliga ígjøgnum øll økir, sum t.d. illgruna um rúsdrekkamisnýtslu og ótrúskap, men nakað so áhugavert sum slatur virkar til at kynda upp í samlívi teirra.

Katalýsatorurin í søguni minnir nógv um eina senu í filminum “American Beauty” frá 1999. Ein pápi sær ígjøgnum vindeygað, at Kevin Spacy lenar seg afturá, og sær son sín bukka seg frameftir. Pápin misskilur støðuna, og so er fanin leysur. Í “Veist tú hvat” sær Karl á tvey starvsfólk í einum fundarhøli: “Knappliga síggi eg eitt høvd stinga upp niðast úr vindeyganum. [...] Og tað er ongin ivi um, at hon er í gongd við okkurt, tí hárið er í andarisi, og hon er reyð í andlitinum og sveittar”. Á besta “American Beauty” hátt verður einn illgruni vaktur, sum fær avgerandi týdning fyri søgugongdina.

**Grugguti gerandisdagurin**

Savnið kann eisini tykjast at bjóða veruleikanum og gerandisdegnum av. Tað síggja vit m.a. í søgum sum “Vetrartíð” og “Oljuberjaoljan” har lesarin í heilum ivast í, hvat gongur fyri seg í veruleikanum, og so “Bara eitt kill afturat”, har tað er eyðsýnt, at høvuðspersónurin sjálvur hevur trupult við at skilja millum veruleika og fiktión. Sum ein stórur mótsetningur til hetta stendur søgan “1000 og eitt ting”. Her er tað navniliga gerandisdagurin, sum verður settur á breddan, og bara við at lesa um ein vanligan morgun hjá einari helst heilt vanligari familju, fær lesarin næstan strongd: “Og so fór øll myllan í gongd. Tey áttu 3 børn, sum skuldu fáast upp úr songini, latast í klæðir og so út í køkin at eta. Matpakkar skuldu eisini gerast. Skúlataskur skuldu gerast klárar. Ítróttartaskur skuldu pakkast. Síðani á vesið at busta tenn.” Gerandisdagurin verður lýstur so væl, men tó so “vanliga”.

**Sámal og málið**

Ein av greiðu styrkjunum hjá rithøvindinum, er málið. Serliga í stuttu søgunum, síggja vit sera beinrakna og sannførandi málnýtslu. T.d. í fyrstu søguni “Bara eitt kill afturat”, har game’arin verður lýstur, og orð sum jútúbari, streamari, twitch-kanal, followers og kills verða nýtt. Ein áhugaverdur máti at innleiða savnið uppá. Lesarin verður drigin inn í ein sera ungdómsligan heim, har enska ávirkanin á føroyska málið er sera greið. Tað sæst kanska, at rithøvundurin dagliga starvast sum miðnámsskúlalærari, og tí eisini hevur gott innlit í málnýtsluna og nógvu ensku orðini, sum føroyski ungdómurin brúkar í dag. Frustratiónin yvir málnýtsluna hjá ungdómin sæst aftur í læraranum í søguni “Nú steðgar hetta!”, tá lærarin gerst illur og skrálar “tosa so for helviti føroyskt!”. Hendan stutta, beinrakna og stuttliga (upp á tann skeiklaða mátan) søgan inniheldur eisini ein tann besta endasetningin í savninum: “Klokkan ringir fyri fríkorterinum, men vit sleppa ikki út aftur í dag”. So stutt og greitt kann tað gerast!

Yngru ummælarnir fara helst ikki at sita og klappa yvir stívar murtar og blóðbað í hesum savninum, men savnið røkkur málbólki sínum væl. Hóast fleiri av stuttsøgunum hava ungar høvuðspersónar, so eru tær flestu at meta sum spenningssøgur. Høvuðsendamálið við søgunum er at fáa lesaran at lesa víðari, og royndi Soll-lesarin hevur so líðandi vant seg við, at okkurt øðrvísi fer at henda. Tað er ikki tað, at søgan ikki verður rundað av, tí tað verður hon ofta, men lesarin veit, at júst tá ið endin nærkast, so verði eg tikin av bóli. Og hetta er sanniliga eisini galdandi í savninum “Virus”. Eftir hvørja stuttsøgu situr lesarin við einum smíli, situr bilsin ella situr og undrast yvir, hvat tað nú var, sum hendi í veruleikanum. Og tað er helst eisini soleiðis, at vit lesa savnið best. Tað undranarsama verður javnmett við gerandisdagin, og markið millum veruleika og fantasi hvørvur.

## At greina stuttsøgur

Stuttsøgur eru – sum orðið sigur – stuttar søgur, sum vanliga bert hava eina søgugongd, og fara ikki í dýpdina við fleiri persónum ella fleiri søgugongdum, soleiðis sum vit kenna tað frá eitt nú skaldsøgum. Í stuttsøgum eru vanliga fáir persónar og oftast eru teir knýttir at sama umhvørvinum. Vanliga umrøða stuttsøgur eitt høvuðstema (hóast fleiri smærri evnir stundum verða umrødd) og tær fevna sjáldan yvir eitt langt tíðarskeið.

**Hvussu greina vit**

At greina einhvønn tekst er í høvuðsheitum at seta tekstinum spurningar. Við hesum spurningum skilir man tekstin sundur fyri at kanna smálutirnar í honum, og fyri at skilja, hvussu hann riggar. Ikki allir spurningar eru eins viðkomandi til hvønn tekst ella hvørja stuttsøgu, tí eru spurningarnir her bert ætlaðir sum íblástur til, hvussu vit kunnu koma fram at teimum týðandi lutunum í teimum einstøku søgunum. Tað er stuttsøgan sjálv, sum ger av, hvørjir spurningar skulu brúkast til at greina hana.

At greina er at spyrja, og tey svarini, sum vit fáa, eru bert áhugaverd, um tey hjálpa okkum at skilja, hvussu stuttsøgan riggar, og sostatt eisini, hvussu hon ávirkar okkum, sum lesa hana.

Tískil lýsa vit ikki smálutir í tekstinum uttan eisini at greiða frá, hvat teirra endamál er.

**Staðfest tekstslagið (stuttsøga)**

- Stuttur prosatekstur – við byrjan, miðju og enda
- Ein søgugongd, ikki fleiri
- Fáir persónar í støðuni
- Stutt tíð
- Avmarkað umhvørvi

**Samandráttur av søguni**

Tað kann vera hent at byrja við at gera ein stuttan samandrátt av stuttsøguni. Tú skalt royna at endurfortelja teir mest týðandi partarnar av søguni í tínum egnu orðum, og tá skalt tú minnast til at fáa teir smálutir við, sum eru viðkomandi í tíni greining av søguni. Ein samandráttur skal altíð vera stuttur, tí má einki óviðkomandi koma við.

**Heiti**

- Hvat merkir heitið?
- Hóskar tað til søguna?

**Tíð**

- Hvussu long er tíðin í søguni (søgutíðin)

- Hvørjari søguligari tíð gongur søgan fyri seg í?

**Umhvørvi**

- Hvar gongur søgan fyri seg?
- Hvussu verður umhvørvið lýst?
- Eru persónslýsingarnar uttanveltaðar (neutralar) ella viðmerkjandi/litaðar

**Persónar**

- Hvørjir eru høvuðspersónar og hvørjir eru eykapersónar?
- Hvussu eru persónarnir lýstir? (Aldur, útsjónd, eginleikar, atferð, meiningar, hvussu síggja tey onnur, o.s.fr.
- Verða persónarnir lýstir beinleiðis (av frásøgufólkinum)?
- Ella (og) verða persónarnir lýstir óbeinleiðis umvegis gerðir, útsagnir og hugsanir teirra.
- Hava teir bæði góðar og ringar síður?
- Eru persónarnir flatir ella rundir? (Meira um hetta longri niðri*)
- Eru persónar, sum eru mótsetningar? Lýs hvussu teir eru tað.
- Broytast summir persónar í søguni? Lýs hvussu.
- Eru summir persónar, sum ikki broytast? Hví?
- Bólka persónar sum annaðhvørt góðir ella ringir, soleiðis sum teir verða lýstir í tekstinum.
- Bólka síðani teir persónar, sum eru mótsetningar.

**Frásøgufólk og sjónarhorn**

- 1. Persónur / 3. Persónur / alvitandi / avmarkað / opið

**Slag av frásøgn**

- Einarøða / samtala / óbeinleiðis tala / tankar
- Lýsandi tekstur (lítið ítøkiligt hendir)
- Virkin tekstur (nógv ítøkiligt hendir)

**Bygnaður**

- Hvussu er tekstur bygdur?
- Sveiggjar spenningsmyndin ella er hon bein?
- Brúkar søgan flashback?
- Er søgan ein ringrás?
- Er endin opin ella afturlatin?

**Málið**

- Hvussu er málið? Hátíðarligt / talumál / fremmandaorð / banniorð / dialekt / slang / orðaspøl
- Er myndamál í stuttsøguni?

**Tema - boðskapur**

- Verður eitt ávíst problem ella evni viðgjørt í stuttsøguni?
- Tosa yvirskipað um evnið uttan at taka persónarnar fram.
- Hvørji týðandi virðir koma fram í søguni?
- Hví verða júst hesi evni tikin fram í søguni?

- Hevur teksturin ein boðskap?

**Sendari – móttakari**

- Hvør er avsendarin?
- Hvørjum er søgan ætlað (móttakari)?

**Samanbering**

- Samanber søguna við aðrar søgur í sama savni.
- Samanber søguna við aðrar søgur / tekstir.
- Hvussu viðger hendan søgan sítt tema samanborið við aðrar søgur, filmar, leikir o.a., sum eisini viðgera sama tema?
- Samanber søguna við aktuell evni.

**Tín meting av søguni**

- Er boðskapurin viðkomandi?
- Kanst tú brúka hann til nakað?
- Met um dygdina hjá tekstinum, tá hugsað verður um mál, lýsingar o.a.

*

Rundir persónar: Ein rundur persónur er ein, ið hevur eina samansetta persónmensku. Hesir persónar hava ofta mótstríðandi síður í síni persónmensku.

Flatir persónar: eru tað øvuta av rundum persónum. Hesir eru grunnir og hava lítla og onga persónmensku. Hesir persónar eru meira at kalla týpur enn einstaklingar.

Dynamiskir persónar: ein dynamiskur persónur er ein, ið broytist yvir tíð, vanliga eftir eina týðandi konflikt ella sum úrslit av einhvørjari kreppu. Flestu dynamisku persónar eru ofta høvuðspersónar, tí mangan er tað so, at høvuðspersónurin skal megna at klára seg í einhvørjari kreppustøðu.

Statiskir persónar: Ein statiskur persónur er ein, sum ikki broytist yvir tíð. Hansara persónmenska er óbroytt og mennist ikki.

## 13 spurningar til rithøvundan

<u>1. Hvaðani fært tú íblástur?</u>

Íblásturin kemur altíð frá óvæntaðum støðum. Og íblástur kann koma allastaðni frá. Ofta kemur hann frá filmum og øðrum søgum og bókum, og onkuntíð kemur hann frá onkrum, sum eg hoyri fólk tosa um. Onkuntíð kemur hann frá onkrum, sum eg havi upplivað sjálvur. Men tað er umráðandi, at ein rithøvundur er opin fyri íblástri, og tað merkir, at mann skal vera forvitin og spyrja nógv. Man skal lesa nógv og fylla alt møguligt í høvdið á sær. Mann veit ikki, hvat mann fær brúk fyri.

<u>2. Hvussu nógva tíð hevur tú brúkt til at skriva savnið?</u>

Eg gav eitt stuttsøgusavn út í 2015. Tað var eitt savn av gomlum søgum, sum eg hevði skrivað yvir 20 ár. Hesaferð eru søgurnar skrivaðar tey seinastu 4 árini og fleiri teirra hanga saman tematiskt.

<u>3. Er "Mammudrongur" bygd á eina veruliga hending?</u>

Nei, eingin søga er bygd á veruligar hendingar sum so, men íblástur kemur oftast frá veruligum hendingum.

<u>4. Hví valdi tú at geva søgurnar út?</u>

Eg havi altíð viljað givið út. Tað hevur onkursvegna altíð verið ein stórur partur av endamálinum. Tá eg skrivaði mínar fyrstu stuttsøgur, plagdi eg altíð at vísa fólkum søgurnar, og tað virkaði sum um teimum dámdi tær væl. So sendi eg tríggjar søgur inn til eina stuttsøgukapping, sum Dimmalætting skipaði fyri, og hóast eg ikki vann, vóru allar tríggjar millum níggju tær bestu, sum komu út í bók. Eg haldi, at hetta fortaldi mær, at eg dugdi nóg væl at finna uppá søgur, sum fólk vilja og tíma at lesa. Men tað tók langa tíð at geva út, tí lívið hevur eisini annað innihald enn skriving.

<u>5. Hvør var høvuðshugsanin aftan fyri stuttsøgusavnið?</u>

Eg vildi skriva nakrar søgur, sum ganga fyri seg í Føroyum her og nú. Altso fáa nútíðina fram í søgunum. Kanska serliga eisini ungdómslív uttan tó at leggja dent á "teir vanligu" ungdómstrupulleikarnar.

<u>6. Hvar hevur tú fingið íblástur til søguna "Ígjøgnum skákrimar"?</u>

Tað er nokk tann elsta søgan í savninum, og eg skrivaði hana, tá alt kjakið um hjúnabandslóg og samkynd var upp á tað hægsta. So íblástur kom burtur úr øllum tí kjakinum. Og eg hugsaði, hvat um ymisk eldri fólk nú komu "úr skápinum" nú, tá tey føldu seg tryggari.

7. Hvør er boðskapurin í bókini?

Tað má lesarin sjálvur um. Eg hugsi ongantíð um boðskap, tá eg skrivi søgur.

8. Hevur tú ein varhuga av, at fólk tulka søgurnar eins og tú?

Eg haldi, at søgur eru bara 50% lidnar, tá rithøvundin er liðugur at skriva, og søgan er komin út. Hini 50% koma upp á pláss, tá fólk lesa søgurnar. So tað at skapa søgur er ein felagsverkætlan millum høvund og lesara. Tí verða okkara tulkingar altíð eitt sindur ymiskar, eisini hóast vit lesa saman í flokkum og tulka søgur saman við einum lærara í føroyskum.

9. Hvørja søgu dámar tær best, og hvørja heldur tú vera mest “fucked up”?

Haha, mær dámar væl tær heilt stuttu: “Tað sama”, “Eitt ljóð úr stovuni” og “Eingin ivi”. “Nú steðgar hetta” er kanska mest fucked-up.

10. Hevur tú nakrantíð viljað gjørt tað, sum lærarin gjørdi í “Nú steðgar hetta”?

Haha, nei, als ikki. Hatta var mest fyri at venda einari kendari søgu á høvdið – eitt plott-tvist, sum eingin hevði væntað. Men tað sum er áhugavert við hesi søguni er, at eg skrivaði hana fyri nøkrum fáum árum síðani, og eg helt, at hetta við skúlaskjóting so so ræðuliga fjart frá okkum í Føroyum, at tað kundi verið stuttligt at skriva eina søgu um tað. Men so hendi okkurt fyri einum ári síðani, at onkur skrivaði okkurt á Jodel-appini, sum beinanvegin bleiv misskilt, men úrslitið varð, at fleiri vórðu bangin fyri hesum, og nógv tordu ikki at koma í skúla, tí tey føldu seg hótt av hesum. Tað fekk meg at hugsa, at óttin fyri hesum ikki er so fjarur her kortini. Men tá var ov seint, og bókin var longu send til forlagið. Eg hugsaði leingi, um eg átti at biðið tey strikað søguna úr savninum, men av tí, at hon longu hevði staðið í Ó-.blaðnum, so helt eg, at tað mundi ikki bila, tí fleiri høvdu longu lisið hana. Eg ivist enn ofta, um tað var rætt at prenta søguna í savninum.

11. Hevur tað, at tú skrivar, ávirkað títt persónliga lív? (Síggja fólk øðrvísi upp á teg?)

Eg veit ikki. Men eg haldi ikki. Eg havi skrivað søgur og havi havt søgur í ymiskum søvnum í eini 20 ár. Eg havi m.a. eisini verið formaður í Rithøvundafelagi Føroya, so tað er nokk ein fastur partur av mínum samleika.

Umframt søgurnar í hesum savninum og fyrra savni mínum, *Glasbúrið*, havi eg skrivað ein hóp av barnasøgum. Flestu teirra hava staðið í *Mín Jólabók*.

12. Hvussu kann perman setast í samband við søgurnar?

Tað er danski myndprýðarin Tatiana Goldberg, sum hevur teknað forsíðumyndina. Hon hevur teknað hana út frá stuttsøguni "Tað sama". So tekningin sigur fyrst og fremst nakað um ta søguna, men mær dámdi hana so væl, at eg valdi at hava hana á permuni á savninum.

Tatiana Goldberg teknaði eisini permuna á fyrsta stuttsøgusavni mínum, *Glasbúrið*.

13. Hvussu er tín skriviprosess?

Eg havi lært, at tað, sum riggar best hjá mær, er bara at fara í gongd við at skriva og ikki planleggja so nógv fyrst. Eg skal bara hava eina byrjan og so royna at fylgja við søguni. Søgan skal sjálv stýra, og so royni eg at fáa alt niður á skermin, soleiðis sum hon vil hava tað. Eg havi sagt tað onkuntíð fyrr, at mær dámar ikki at tosa um at "finna upp á" søgur, men heldur at finna søgur. Tað er eitt sindur sum arkeologi. Mann skrivar bara, og so í skriviprosessini gravar mann søguna fram burturúr sínum minni, hugflogi og upplivingum. So eg byrji bara at skriva út frá tí. Seinni er so neyðugt at umskriva søguna. Tá veit eg nøkulunda, hvat søgan vil, og so ruddi eg upp í henni, flyti runt upp á brotini og striki eitthvørt fyri at fáa okkurt mynstur betur fram. Eg havi ofta roynt at gjørt tað øvuta, altso roynt at stýrt søguni út frá onkrari fatan, sum eg havi havt frammanundan, ella at siga, at nú vil eg skriva eina søgu um hetta og hatta, og so stríðast ímóti tí, sum søgan sjálv vil, fyri at fáa hana soleiðis, sum eg vil. Hetta riggar ongantíð, og tær søgurnar fara í skrell.

## Um rithøvundin



Sámal Soll er føddur 25. juni í 1977 sum Sámal Kristian Jacobsen í Havn. Hann er rithøvundur, lærari og fyrrverandi formaður í Rithøvundafelag Føroya. Hann er útbúgvin cand. mag í enskum máli og bókmentum frá universitetinum í Aalborg. Í løtuni lesur hann føroyskt á Fróðskaparsetri Føroya. Hann er elstur av 7 systkjum, vaks upp við Oyggjarvegin í Havn og flutti við familjuni til Hoyvíkar at búgva í 1984 og fór at ganga í Hoyvíkar skúla. Hann fór á studentaskúlan í Hoydølum, har hann tók prógv í 1997. Síðan fór hann niður til Aalborg at lesa enskt. Hann tók BA prógv í enskum í 2001, og Cand. Mag í enskum í 2004. Í 2007 fekk hann arbeiði í Føroya Banka sum samskiftisfólk og starvaðist har til 2011. Síðani 2007 hevur hann undirvíst parttíð í enskum í Hoydølum, men fór at undirvísa fulla tíð í 2011. Hann hevur eisini undirvíst eitt ár á Tekniska skúla í Havn.

Tær fyrstu stuttsøgurnar skrivaði hann, meðan hann gekk í Hoydølum. Í 2005 varð søgan "Ver ikki bangin" vald sum onnur vinnarasøgan í stuttsøgukapping, sum Bókadeildin skrivaði út. Árið eftir varð søgan givin út í søgusavni á 7 málum umframt føroyskum. Hann hevði tríggjar stuttsøgur við í savninum Russiskur dansur, sum Dimmalætting gav út í 2001 og hevur týtt stuttsøgur úr enskum, eftir m.a. Ernest Hemingway og Stephen King, sum hava staðið í Vencili og Varðanum. Hann týðir gátubøkurnar í røðini Detektivstovan hjá Lassa og Maiu, sum Bókadeildin gevur út.

Í 2015 gav hann út stuttsøgusavnið Glasbúrið, ið er eitt savn við 19 stuttsøgum. Forlagið Sprotin gav út.

**Leinki:**

Almenna heimasíðan
https://samalsoll.wordpress.com/
Wikipedia:
https://fo.wikipedia.org/wiki/S%C3%A1mal_Soll
https://da.wikipedia.org/wiki/S%C3%A1mal_Soll
Instagram:
https://www.instagram.com/samalsoll/

Rithøvundafelagið: http://www.rit.fo/
(trýst á “limir”)
Facebook:
https://www.facebook.com/samalsoll &
https://www.facebook.com/samalsollwriter/
Tumblr: http://samalsoll.tumblr.com/
Teldupostur: samalsoll@gmail.com


SÁMAL SOLL
VIRUS
- 13 SØGUR